**VIÐMERKINGAR**

# Flagdagshaldið misnýtt

**Maria í Skorini**
*Tórshavn*

Nú eru 65 ár liðin, síðan føroyingar fingu egið flagg, og var tað skelkandi mánadagin, sjálvan flaggdagin, at vera vitni til, at røðarin á flaggdagshaldinum í Havn vísti fram eitt nýtt flagg, sum skuldi umboða ríkið, t.v.s. Føroyar, Danmark og Grønland. Hetta er at misbrúka flaggdagin, sum altíð hevur verið brúktur til at heiðra okkara egna flagg, "Merkið". Kanska skuldi man bara reagera sum løgmaður og tikið tað sum skemt, men eg haldi, at hetta var bæði framligt, óhóskandi og óvirðiligt. Um tað nú var alneyðugt at vísa hetta "vakra flagg", so kundi tað verið gjørt við eitt annað høvi og ikki á flaggdegnum sjálvum. Tað er í veruleikanum sera smakleyst. Um Malan Marnersdóttir ikki hevði nýtt sjálvt flaggdagshaldið at sýna fram hetta flagg, hevði tað ikki vakt nakran ans yvirhøvur. Men hvussu kann eitt flagg umboða trý lond, har tvey av teimum ikki hava sjálvstýri. Fer hetta flaggið at umboða tað danska ríkið, so fer tað, sum nú er, at umboða eina óbroytta støðu, har tað verður góðtikið, at eitt land hevur ræði á hinum báðum. Hetta kann eingin taka í álvara. Tað undrar meg eisini, at hetta flagg hevur fingið sítt pláss í sjálvum Listaskálanum, tí so kann ein og hvør koma við sínum tápuligu hugskotum og brúka Listaskálan at sýna fram fyri almenninginum.

# Sorgarleikurin í Vági

**Eilif Samuelsen**



Nú er málið um Miðnámsskúlan í Suðuroynni farið heilt av sporinum. Ein hovsaloysnin fyri og onnur eftir spretta nú fram úr hurlivasanum. Og slíkar ov illa umhugsaðar loysnir eru sum kunnugt av tí ónda, og mistøkini koma afturumaftur og verða afturlønt seinni í gráum kálvskinni.

Málið var púra greitt frammanundan. Løgtingið samtykti 2. mai 2003 einmælt, við 32 atkvøðum eitt uppskot frá landsstýrinum, at miðnámsskúli skuldi verða bygdur í Vági. Síðani tá hevur at kalla einki verið at hoyrt um nakra ónøgd við ta avgerðina.

So kom stóra orðaskiftið um ringa búskaparliga standin í Suðuroynni, serliga í Vági, og landsstýrið kom so við einum av sínum íkøstum til at bøta um ringa standin, nevniliga at byggja eitt røktarheim aftrat í oynni, og tað skuldi sjálvandi, sum rætt og rímiligt var, vera í Vági. Hetta var eitt gott uppskot og hevði útvegað eitt rættiliga munandi tal av arbeiðsplássum.

Men so kom landsstýrið við tí ófatiliga illa umhugsaðu treytini, at fingu vágbingar røktarheimið, so skuldi miðnámsskúlin, sum teir undir ongum umstøðum vilja av við, flytast av bygdini og til Hovs. Og hetta sjónarmið hevur løgmaður stívrent hildið fast við líka síðani. Hvat skal ein slík valdsstaðfesting gera gott fyri?

Øll vita væl, at tað eru fleiri fortreytir, sum landsstýrið hevur at umhugsa. Ein er tað aldagamla stríðið millum sunnara og norðara part av oynni, ella millum Tvøroyri og Vág. Tann grynsta og minst ábyrgdarfulla loysnin í hesum førinum er at finna eina geografiska millumloysn, altso at leggja skúlan í Hovi. Grundgevingin, at tað verður styttri hjá teimum norðanfyri, verður sjálvandi uppvigað av, at tað jú verður longri hjá teimum sunnanfyri. Ein onnur fortreyt er, at almanna- og heilsuskúlin og miðnámsskúlin skulu byggjast saman. Tað hevur verið víst á frammanundan, at tað at broyta tekningarnar, so báðir skúlaformar kunnu hýsast undir somu lon í Vági, væl letur seg gera.

Røddir hava verið frammi um, at handils- og fiskivinnuútbúgving eisini skuldi vera á skúlanum og løgmaður nevndi enntá eisini tekniskan skúla. Tað er ikki bara lukkan, at nakrir fáir handilsskúla- ella fiskivinnuskúlanæmingar skulu ganga har við skerdan lut og fáa eina triðjarangs útbúgving. Tað hevur verið roynt áður, og tann royndin eggjar ikki uttan víðari til at verða endurtikin. Ið hvussu er skulu politikararnir gera sær greitt, hvat kostnaðurin er at fáa slíkum næmingum eina líkinda undirvísing og vera fúsir at rinda raksturin.

Og skuldi landsstýrið himprast við, at Vágur hevði fingið ov nógv, um tey eisini fingu røktarheim, so átti landsstýrið at vita, at Tvøroyri við sjúkrahúsinum og røktarheiminum hevur 110,5 fulltíðarstørv. So tað er langur vegur til Vágur verður vælsignaður við fleiri almennum føstum størvum.

Landsstýrið gjørdi eitt mistak við at nerta við miðnámsskúlan í Vági. Hevði landsstýrið verið so víðskygt bara at sagt, at teir høvdu samtykt, at eitt røktarheim kundi byggjast í Vági, so høvdu allir suðuroyingar innast inni frøtt seg av fullum huga. Og ynskið hjá landsstýrinum, um at øll oyggin gjørdist ein kommuna hevði gingið út av sær sjálvum innan stutta tíð, og so hevði meirilutin í Vágs kommunu sloppið undan at koma við hesum seinasta desperata uppskotinum.

Og tað hevði ikki farið eitt flindur av virðingini fyri landsstýrinum, um teir viðgingu, at teirra fyrsta uppskot ikki var gjøgnumhugsað so væl, sum tað átti.

Nú er málið so lagt til løgtingið til avgerðar. Tað skal vera okkara vón, at tinglimir eisini í hesum máli megna at hevja seg upp um vanligar taktiskar bindingar og fáa eina skynsama loysn á málinum.

Hon liggur ikki í framlagda uppskotinum í verandi líki.

# Yvirlýsing frá Norðoya Tjóðveldisfelag

**Nevndin í Norðoya Tjóðveldisfelag**

Norðoya Tjóðveldisfelag átalar at løgmaður Jóannes Eidesgaard hevur lagt fyri Løgtingið mál nr. 95 "Uppskot til lóg um altjóðarættarligu sáttmálar Føroya landsstýris at gera" og mál nr. 96 "Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar "Lov om Færøerenes landsstyres indgåelse af folkeretlige aftaler""

Verða hesi mál samtykt í Løgtinginum, verður tað til stóran skaða fyri sjálvstýrisstríð føroyinga. Við hesum lógum verða Føroyar bundnar tættari til Danmark. Føroyingar fáa eingi nýggj rættindi við hesum lógum, men hinvegin fær danska stjórnin staðfest, at vit eru heilt og fult undirgivin danskt statsvald og donsku grundlógina.

Góðtekur Løgtingið hesar lógir, er tað eitt afturstig í mun til heimastýrislógina, tí sjálvt við henni góðkendi Løgtingið ikki danska ríkislóggávu, ið beinleiðis slær fast, at Løgtingið hevur ongar sjálvstøðugar heimildir yvirhøvur. Føroyar vera bert at meta sum "Kongeriget Danmark forsåvidt angår Færøerene."

Fyri at undirstrika hetta vilja vit vísa til brot úr donsku viðmerkingunum til lógaruppskotið:

"Som nævnt vil der ikke være tale om en egentlig overladelse af beføjelser til at handle i mellemfolkelige anliggender. Regeringen vil derfor fortsat have udenrigspolitisk kompetence også i de anliggender, der omfattes af en bemyndigelse til det færøske landsstyre."

"Hensynet til rigsenheden og grundlovens § 19 indebærer endvidere, at Færøernes landsstyre ved udøvelsen af udenrigspolitiske handlinger - der som anført bliver folkeretligt bindende for hele riget - vil være afskåret fra at handle i strid med rigets interesser, herunder rigets generelle udenrigspolitik."

Somuleiðis vilja vit átala at hóast fleiri føroyskir og útlendskir løgfrøðingar og serfrøðingar í altjóðarætti hava víst á, at hesi lógaruppskot einki framstig eru, men heldur eitt afturstig og binding av føroyskum rættindum, roynir samgongan at skrumbla málini gjøgnum Løgtingið og uttanlandsnevndina, uttan at loyva andstøðuni at innkalla altjóða serfrøðingar, ið kunnu lýsa avleiðingarnar av lógaruppskotunum fyri Føroyar.

Norðoya Tjóðveldisfelag heitir tí á Løgtingið um beinanvegin at støðga undirbrotligu støðuni og forða fyri, at avtalurnar hjá løgmanni og donsku stjórnini skerja rættindini hjá Føroya fólki og Føroya løgtingi.

Norðoya Tjóðveldisfelag fer inniliga at heita á allar sjálvstýriskreftir á Tingi um ikki at atkvøða fyri hesum báðum málunum.

# Svar til lesarabræv

**Bjarni Djurholm**
*landsstýrismaður*



Olaf í Garði Joensen, løgtingsmaður fyri Tjóðveldisflokkin, hevur í opnum brævi í Dimmalætting og Sosialinum 18. apríl 2005 sett fram 2 spurningar til mín viðvíkjandi endurgjaldi fyri mist vetrarbit.

Til spurningarnar báðar er at siga, at reglurnar um vetrarfriðing og endurgjald í hesum sambandi eru ásettar í §§ 36, 37 og 37a í Lov nr. 172 af 18. maj 1937 for Færøerne om haugers styrelse og drift m.m. (Hagalógin). Hesar ásetingar eru samtyktar í 1943, og eru tær galdandi fyri bæði ognar- og landsjørð.

Sambært Løgtingstíðindum varð tikið undir við at vetrarfriðing kundi fremjast, men - sum tikið varð til - so kann vetrarfriðing hava við sær ampa fyri seyðahaldið, um so er, at endurgjaldsupphæddin ikki verður brúkt til at bøta um hagan við. Mett var tí neyðugt, at tað almenna skuldi hava eftirlit við, at endurgjaldsupphæddin fyri mist vetrarbit varð brúkt forsvarliga og bert til at bøta um seyðahaldið.

Í hesum sambandi varð mett rættast, at endurgjaldsupphæddin í fyrsta lagi varð deponerað í Jarðargrunninum og ikki útgoldin eigaranum, fyrr enn tað var ávíst Jarðarráðnum, at tað í viðkomandi haga vóru gjørd tiltøk, sum vórðu mett at tæna til hjálp og nútímansgerð av seyðahaldinum í haganum.

Bjørk viðger henda spurning í "Færøsk bygderet I" á síðu 165 — 166 og á síðu 171 og nevnir sum dømi um betran av seyðahaldinum, at seyðahús ella líknandi verður gjørt.

Endurgjaldið fyri mist vetrarbit er sostatt, tá hetta endurgjald verður goldið inn til Jarðargrunnin nú Búnaðargrunnin), at meta sum ogn hjá viðkomandi haga, men nýtsla má ikki fara fram, uttan so, at ábøtur eru gjørdar í haganum, seyðahaldinum ella haganum annars til frama, og verður tað tá Búnaðarstovan, sum tá kemur at meta um hesi viðurskifti, og hvussu nógv kann verða goldið út.

Seinastu 20-25 árini hava nakrar bygdir/býir sett upp býarhegn, ið hevur við sær, at lendið innan fyri býarhegnið verður friðað fyri vetrarbit.

Uppsetanin av býarhegni er úrslit av samráðingum millum kommunu og tann haga, ið eigur bitið. Mannagongdin hevur verið, at slíkur sáttmáli skuldi verða góðkendur av Jarðarráðnum, sum umsat landsjørðina. Treytir Jarðarráðsins fyri at góðkenna vóru at

- avloysingin av biti var tann prísur, sum Jarðarráðið kravdi, tá talan var um vetrarfriðing eftir § 36 og sum varð kravt í sambandi við sølu av jørð til bygging. o.l.
- at avloysingargjaldið var goldið og møguliga brúkt sambært § 37a.

Farið verður í næstum undir at endurskoða alla landbúnaðarlóggávuna í síni heild, umframt at gera uppskot til nýggjan landbúnaðarpolitikk. Tað verður Vinnumálaráðið saman við Búnaðargrunninum, Búnaðarstovuni, Bóndafelag Føroya og Óðalsfelagnum, sum fer at orða uppskotið til nýggja landbúnaðarlóggávu. Í hesum sambandi er givið, at spurningurin um endurgjald fyri mist vetrarbit verður viðgjørdur.